# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ov dýrt at liva í Føroyum

Nú um dagarnar kom ein melding frá Arbeiðarafeløgunum um, at ein miðalløn í Føroya Arbeiðarafelag var 168.000 krónur um árið. Hetta er í dagsins samfelag ein lág løn. Tað er freistandi at koma fram til loysnina bara at hækka hesa løn og so lata alt annað standa til, men hvat eru undirliggjandi grundirnar fyri, at man ikki klárar seg við einari slíkari løn í dagsins Føroyum?

Vit hava – sammett við grannalond, Danmark undantikið – eitt høgt skattatrýst á allar lønir. Vit hava eitt høgt MVG, høgt oljuavgjald, høgt bilavgjald, høgan vegskatt og ivaleyst heimsins hægsta streymprís. Harafturat hava vit sjúkrakassagjald, kringvarpsgjald, ALS gjald, bummpengar og onnur almenn gjøld, sum ikki fara yvir skattin. Útyvir hetta, so eru flestu dagligdagsvørur, undantikið kjøt og einstakar landbúnaðarvørur, nógv dýrari í Føroyum, enn í flestu grannalondum okkara. Tað sigur seg sjálvt, at tað má vera ringt hjá fólki við vanligum lønum at fáa alt at hanga saman fíggjarliga.

Hvat kann so gerast? Tað vil altíð vera so, at Føroyar er eitt hampuliga dýrt samfelag at reka á summum økjum, men á øðrum økjum gera vit sjálvi samfelagið dýrt við at kopiera danska lóggávu - viðhvørt uttan at nakar hevur biðið um tað - og danska umsiting, sum er gjørd til eitt samfelag við 5 milliónum íbugvum. Her er pláss fyri rationalisering av lógum og mannagongdum, so samfelagið gerst bíligari at reka, uttan at borgarin merkir tað. Vit mugu læra okkum at brúka teir fyrimunir, tað inniber, at vera eitt lítið land. Tað gera vit ikki í dag.

Almenn eykagjøld útyvir skattin, er ein óskikkur, sum eisini er ósolidariskur, tí øll frá pensionistinum til rokskiparan gjalda vanliga somu upphædd – t.d. kringvarpsgjaldið. Skal tað almenna fíggja eitt ávíst virksemi, so eigur tað at vera gjørt yvir eina solidariska skattaskipan.

At oljuavgjaldið ikki longur er tengt at oljuprísinum er eisini ein vanlukka fyri lágu lønirnar í Føroyum, og eigur hetta at vera broytt.

Politikarar mugu endurskoða øll avjgøld og skattir útfrá, hvat borgaranum tørvar og borgarin vil. Gera vit einki, so vil ein stórur partur av føroyingum hava fíggjarligar trupulleikar um eitt ár ella tvey, um tey ikki longu hava tað. Eitt skatta og avgjaldstrýst sum tað føroyska er ikki rættvísgjørt í teimum almennu tænastunum, sum føroyski borgarin fær.

Var samsvar harímillum, so var lønarhækkan einasta loysnin fyri verkamannafeløgini, men tíverri tykjast vera nógv størri undirliggjandi trupulleikar, sum eisini mugu loysast, fyri at vanligi føroyingurin skal hava ráð at liva í Føroyum. Loysnin er fyri ein stóran part politisk.

**Sosialurin**

## Er Tórshavnar býráð rættsiktað?

ANNA ARABO

Sat og hugdi dag og viku Týrsdagin 17/4. Har var eitt kjak, sum borgarstjórin i Havnar kommunu var við í.

Hann tosaði um 200 millónir, sum vóru brúktar til kai, læknahøli, skúla og ítróttarhøll. Men hvør skal brúka hesa stásuligu høll og skúla?

Tey ungu fáa ikki loyvi at seta búgv her í Kollafirði. Tey søkja um grundstykki her norðuri, men tey fáa eitt nei. Jú, onkur fekk bjóðað stykki í Hoyvíkshaganum. Nær er Hoyvikshagin komin til Kollafjarðar at liggja?

Her á Oyrareingjum, Signabø og Langasandi er nógv slættlendi at byggja á, men Havnar kommuna sigur nei.

Tað eru fleiri ung, sum mugu flyta til aðrar bygdir, har er gamaní at fáa grundstykki, men tað kann ikki vera meiningin. Hvat ætlar Havnar kommuna, skulu Oyrareingir, Signabøur og Langasandur avtoftast? Ítróttarhøllin kann kanska brúkast til ellisheim um nøkur ár, tí við hesari framferð, sum H. K. bjóðar okkum, so verða bara gomul fólk eftir.

á Oyrareingjum 19/4

## Ábyrgdin av bútilboðum til heimleys

KOMMUNUSAMSKIPAN FØROYA

Trivnaðarnevnd løgtingsins hevur lagt fram álit í tingmáli nr. 72 viðvíkjandi uppskoti hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum um serlig bútilboð til tey heimleysu.

Av tí at nevndarálitið og málsgongdin sum heild er ørkymlandi fyri Kommunusamskipan Føroya, loyva vit okkum hesa stuttu viðmerking, nú uppskotið skal til aðru viðgerð í dag 18. apríl 2007.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum fekk í juni 2005 handað álit um støðuna hjá teimum heimleysu í Føroyum. KSF tók lut í hesum arbeiði, har tað m.a. varð mælt til, at kommunurnar hava ábyrgdina at veita teimum heimleysu bútilboð.

Landsstýrismaðurin sendi samsvarandi hesum hin 22. september 2006 uppskot til hoyringar um serlig bútilboð til heimleys. Uppskotið fevndi eisini um virkisfremjandi stuðul, umsorgan v.m., og hevði KSF í hoyringsskrivi dagfest 16. oktober 2006 fleiri konstruktivar viðmerkingar til uppskotið.

KSF fréttir tó einki aftur frá landsstýrismanninum fyrr enn vit staðfesta, at nýtt uppskot er lagt fyri løgtingið. Nýggja uppskotið fevnir bert um at veita bútilboð, sum landið nú skal hava ábyrgdina av umvegis sjálvboðnar hjálparfelagsskapir.

Í viðmerkingunum verður sagt um tað fyrra uppskotið, at tað fekk so nógvar atfinningar serliga frá kommunufeløgunum, at avgjørt varð at broyta uppskotið soleiðis, at ummælissvarini vóru tikin til eftirtektar.

Til hetta skal KSF viðmerkja, at hoyringsskrivið hjá KSF er á ongan hátt atfinningarsamt um ta yvirskipaðu kommunalu ábyrgdina á økinum, men høvdu vit fleiri viðmerkingar og ivamál um ítøkiligu ásetingarnar í uppskotinum, og tí er grundgevingin fyri broytta ábyrgdarbýtinum ikki røtt.

KSF fekk ongantíð seinna lógaruppskotið, sum landsstýrismaðurin nú hevur lagt fyri tingið, til hoyringar, og tað gjørdi sum skilst heldur eingin annar.

Tað kom tó sera óvart á, at trivnaðarnevndin í áliti sínum til løgtingið ber fram undir, at kommunurnar ikki vilja hava ábyrgdina av bústaðarviðurskiftunum hjá teimum heimleysu. KSF er av teirri áskoðan, at uppgávan og ábyrgdin at veita heimleysum hóskandi bútilboð er felagskommunal, og tað harmar tí KSF almikið, at heldur ikki trivnaðarnevndin tók stig til nakra hoyring um uppskotið.

## *Berin:* Sjálvhjálparbólkar fyri børn og ung

TÍÐINDASKRIV

Nú byrja vit aftur við nýggjum sjálvhjálparbólkum fyri børn og ung, sum hava mist foreldur ella systkin við deyða. Aldurin fyri luttøku er frá 8 ár og uppeftir.

Bólkarnir eru ætlaðir, sum ein hjálp til at fáa ein liviligan gerandisdag. Bólkarnir eru ikki ætlaðir sum kreppuhjálp. Tí skal nakað vera umliðið, síðani avvarðandi doyði.

Børn og ung, sum hava mist foreldur ella systkin fyri fleiri árum síðani, hava eisini havt gleði av bólkunum.

Bólkarnir eru býttir upp eftir aldri, og verða tað tí tilmeldingarnar sum avgera, hvørjar aldursbólkar vit hava komandi skeið. Tað kostar 300 kr. fyri hvønn.

Tey, sum vilja verða við, vera biðin um at siga frá sum skjótast. Tað kann gerast hjá Jóngerð Poulsen á tlf. 316419/227074 ella við T-posti: HYPERLINK ”mailto:jongerd.poulsen@skulin.fo” jongerd.poulsen@skulin.fo

Sum nakað nýtt, kunnu vit nú eisini bjóða foreldrum, sum hava mist børn, í sjálvhjálp-arbólk. Kostnaðurin er 1000 kr. fyri hvønn.

Tey, sum vilja verða við, vera biðin um at siga frá sum skjótast hjá Kathrinu L. Joensen, tlf. 279667 ella við T-posti: *kathrina.lindenskov.joensen@skulin.fo*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.